# Nordic Music Awards savnaði s

**Pharrel, Coldplay, Robbie Williams, Shakira, Kent, Cardigans, Outlandish og Mew vóru nøkur av nøvnunum, ið vóru savnaði í Keypmannahavn, tá Nordic Music Awards varð hildið**

NORDIC MUSIC AWARDS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið vóru norðurlendsku tónleikavirðislønirnar Nordic Music Awards handaðar, og planet.fo var á staðnum. Virðislønirnar er ein felags sjónvarpssending, sum sviar, danir og norrmenn gera. Í ár var tiltakið í Keypmannahavn.

### Stór nøvn

Hóast Nordic Music Awards er eitt nýtt rættuliga sjónvarpskonsept, so hava Svørríkið, Noreg og Danmark hvørt í sínum lag havt tónleikavirðislønir í nógv ár, men eigin ivi er um, at við at savna virðislønirnar, er tiltakið vaksið nógv og vorðið nógv meira lokkandi fyri tónleikanøvn at luttaka á bæði fyri norðurlendsk og útlendsk. Sostatt var møguligt at uppliva m.o. Pharrel, Coldplay, Robbie Williams, Shakira, Kent, Cardigans, Outlandish og Mew. Hetta sást aftur á áskoðaratølunum, risa høllin Forum var á tremur við fólki.Serliga vóru tað danir og sviar, ið vóru í meiriluta.

### Fyrst og fremst sjónvarp

Tiltakið var fyrst og fremst ein sjónvarpssending, og var týðiliga merkt av hesum. Fyri at sleppa undan trupulleikum við feed og ekko í stóru betonghøllioni, var ljóði rættuliga spakuligt, og tí var ofta torført at hoyra hvat tey, sum lótu heiðurslønirnar søgdu, tónleikurin ljóðaði alt annað enn væl í rungandi høllini, har alt leyp saman í eina suppu. Men showið var flott, sjónsansurin var væl og virðiliga stimuleraður. Fólk vóru pyntað, og nógvar stjørnur luttóku. Sjáldan hava so nógv kend fólk úr skandinavisku londunum verið savnað undir einum taki.

### Sjónvarpshyggjarin hevði maktina

Tað vóru hyggjararnir, ið avgjørdu hvør fekk ymisku virðislønirnar, seinastu vikurnar hava svensku, donsku og norsku hyggjararnir sent



*Robbie Williams var størsta stjørnan í Forum leygarkvøldið*
*Mynd: Scanpix Danmark*

SMS við sínum atkvøðum. Tilsamans vóru 11 virðislønir latnar, men tvær av hesum: tann fyri besta norðurlendska frambrot og heiðursvirðislønin vóru avgjørdar av eini serligari dómsnevnd.

Gwen Stefani, Eminem og Coldplay vunnu virðislønirnar fyri bestu altjóða tónlistarfólk og bólkar, men av hesum var, tað bert Coldplay, ið var á staðnum at taka ímóti virðislønini. Kent vann heiðurslønina fyri besta norðurlendska tónlistarfólk/bólk, og blaðunga Amy Diamonds vann fyri besta norðurlendska hitt við lagnum "What's In It For Me"

## Latnar virðislønir á Nordic Music Awards

**Besta danska tónlistarfólk/bólkur:** Nik & Jay
**Besta norska tónlistarfólk/bólkur:** Madrugada
**Besta svenska tónlistarfólk/bólkur:** Daniel Lindstrøm
**Besta altjóða mannliga tónlistarfólk:** Eminem
**Besta altjóða kvinnuliga tónlistarfólk:** Gwen Stefani
**Besta altjóða tónleikabólkur:** Coldplay
**Besta norðurlendska hitt:** Amy Diamond - "What's In It For Me"
**Besta norðurlendska sjónbandalag:** Timbuktu - "Det löser sig"
**Besta norðurlendska tónlistarfólk/bólkur:** Kent, bólkurin fær TeliaSonera Surfport-virðislønina á 100.000 svenskar krónir.
**Besta norðurlendska frambrot:** Mew, bólkurin fær Sony Ericsson-virðislønina á 100.000 svenskar krónir:
**Heiðursvirðislønin:** D-A-D



## Kent í svørtum

*Størsta svenska tónleikanavnið Kent var á Nordic Music Awards, har bólkurin frumframførdi frálíka lagið: "Ansgar & Evelyne". Bólkurin fylgdi tí svarta rokktrendinum og var allur svartur. Kent vann virðislønina, sum besti norðurlendski bólkur og fekk ein kekk á 100.000 kr. at keypa svartar leður- og kovboykuksir fyri*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Føroyingar á Nordic Music Awards

**Ikki bert føroysku fjølmiðlarnir Planet.fo og SVF vóru umboðaðir á NMA. Eisini millum áskoðararnar í Forum leygarkvøldið vóru føroyingar. Vit hittu Odu Ellingsgaard og Meinhard Mikladal, ið vóru komin niður á Coldplay konsert kvøldið eftir, og tí eisini fóru á hetta tiltak**

*Oda Ellingsgaard.*



*Hetta var suverent, tað var fantastiskt at síggja Coldplay, Robbie Williams og Mew live, vit stóu fremst alla tíðina. Tað var serliga Coldplay, sum var gott. Tað var tann konsertin í kvøld. Eg eri í øllum førum væl nøgd við kvøldið.*

*Meinhard Mikladal*



*Hatta var heilt ótrúligt. Eg haldi sjálvur, at Coldpalay spældu bestu konsertina. Men eisini Robbie Williams og Mew vóru góðir. Eg eri akkurát byrjaður at lurta eftir Mew og kenni teir bara á fløgu. Men teir eru ein ótrúliga góður live bólkur.*

## Saybia tapti tvær virðislønir

*MjúS gestirnir úr Saybia vóru í uppskoti til tvær virðislønir, bæði besti danski bólkur og besti norðurlendski bólkur, men teir taptu til Nik & Jay og Kent. Saybia er í løtuni best seljandi danski bólkur, og hetta var óiva ein góð troyst, tá teir vóru tómhentir heim frá NMA:*
*Mynd: Jonhard Hammer*

